# Vælkomin á Finsen!



Bústaðir ynskir tær hjartaliga tillukku við íbúðini. Vónandi fer tú at trívast væl á Finsen.

Tú hevur óivað nógvar spurningar í sambandi við innflytingina. Tí hava vit í hesum vegleiðingarskrivi savnað kunning um ymiskt, sum kann vera tær til nyttu, nú tú flytur inn í eina nýggja leiguíbúð.

Og minst til eisini at lesa leigusáttmálan og húsreglurnar væl ígjøgnum.

Vinarligar heilsanir,

**Bústaðir**

# Innihaldsyvirlit

Lyklar ... 3
Útistongdur ... 3
Postkassar ... 3
Vaskirúm ... 3
Bora hol í veggir ella loft og at hongja upp ... 3
Persiennir/gardinur ... 4
Hvítvørur og tílíkt í íbúðini ... 4
Terrassuhitarir og grill ... 4
Hurðar - læsa og lata hurðar upp ... 4
Felags inngangir og elevatorar ... 4
Hurð inn á gangin ... 4
Hurð til íbúðina ... 5
Hurð til altan ... 5
Hurð til vaskirúm og goymslurúm ... 5
Vindeygu – lata upp og aftur ... 5
Reingerð og viðlíkahald av hurðum og vindeygum ... 5
Sikringar og HPFI-rele ... 5
Roykvarnarar ... 5
Hiti ... 5
Installatiónsskáp ... 5
Ventilatión ... 5
Baðirúm ... 6
Ljós í loftinum ... 6
Køkurin ... 6
Sjónvarp og internet ... 6
Gólv – viðlíkahald ... 6
Gangir ... 6
Elevatorar ... 6
Hjartastartari ... 7
Parkering ... 7
Skaðar í arbeiðstíð og aðrir fyrispurningar ... 7
Skaðar uttanfyri vanliga arbeiðstíð ... 7
Húsavørður ... 7
Broytingar ... 8

## Lyklar

Tú hevur fingið útflýggjað 2 chip-lyklar, 2 cylindaralyklar og 2 lyklar til postkassan.

Chip-lyklarnir nýtir tú til høvuðsinngongdirnar, goymsluhølið við vaskirúmið og vaskirúmið. Um tú missur chip-lykil burtur, má tú siga Bústøðum frá, so lykilin kann gerast óvirkin og tú kanst fáa gjørt ein nýggjan.

Cylingaralyklarnir eru eins og passa til hurðina til tína íbúð.

Lykilin til postkassan passar til tín postkassa.

Ansa væl eftir lyklunum. Tað kann vera kostnaðarmikið at missa teir burtur, sí serstakt skriv “Lyklar á Finsen”, sum er um eyka lyklar, hvussu tú ger, tá lyklar verða burturmistir, og kostnaðir.

## Útistongdur

Um tú hevur stongt teg úti, kanst tú ringja beinleiðis til lásasmiðin, Jógvan Jørgensen frá Systemlyklum, á tel. 217600. Kostnaðurin fyri hesa tænastu er kr. 600 hvørja ferð, sum verður tikið sjálvvirkandi saman við næstu húsaleigu. Tí mást framvísa samleikaprógv, áðrenn hurðin kann verða latin upp.

## Postkassar

Íbúðin hevur ein postkassa, sum er hongdur á veggin undir trappuni við høvuðsingongdirnar í 50 og 52. Á postkassanum stendur nummar á íbúðini. Tú skal sjálvur seta navn á navnaskeltið. Tú hevur tveir lyklar til postkassan.

## Vaskirúm

Felags vaskirúm er í niðastu hædd á horninum Tróndargøta/Sjúrðargøta við trimum vaskimaskinum og tveimum turkitrumlum. Tú hevur ikki loyvi at fáa tær tína egnu vaskimaskinu í íbúðina.

Inngongdin til vaskirúmið er frá tunlinum inn í garðin frá Sjúrðargøtu.

Eingin bíleggingarskipan er til maskinurnar, so tú kanst nýta maskinur, sum eru tøkar.

Tú skal brúka chip-lykilin fyri at koma inn í vaskirúmið. Tú skal ikki hava vaskipulvur o.tíl. við, tí vaskimaskinurnar hava sjálvvirkandi áfylling av svanamerktum og parfumufríum vaskievni. Vegleiðing um nýtslu av vaskimaskinu og turkitrumlu hongur uppi í vaskirúminum.

## Bora hol í veggir ella loft og at hongja upp

Nakrir veggir eru av betong. Har skal nýtast borimaskina (borihamari) við Sds-borðum fyri at kunna heingja nakað upp. Fyri ikki at gera ov greflig hol í veggirnar, skal diametur á boranum í mesta lagi vera 6-8 mm. Nakrir veggir eru av gips. Til teir skulu serlig plugs nýtast, sum borast skal fyri. Ansa eftir ikki at gera størri hol enn hægst neyðugt. Og tá flutt verður út aftur og takast skal niður aftur av vegginum, má ansast væl eftir ikki at gera størri skaða á veggirnar, enn sjálvt boraða holið. Leigarin má av sínum depositum gjalda fyri størri skaðar á veggirnar/loftini og í hesum sambandi eisini málaraarbeiði, tá flutt verður út aftur.

Fyri at tryggja at umvælingarnar eftir hol í veggjunum verður gjørt rætt, skulu okkara húsavørðar umvæla veggirnar.

Tá lampur skulu heingjast upp í loftini, má ansast væl eftir at seta krókarnar í, har sum timbur er uppiyvir loftinum, og ongantíð mitt á loftspláturnar. Setið krókar onkustaðni har loftspláturnar koma saman á longu síðuni (á smølu síðuni er sum oftast ikki timbur aftanfyri).

Veggirnir í baðirúmunum eru klæddir við linolium. Einki skal borast ella skrúvast í veggirnar, har linolium er, men loyvt er at bora fyri t.d. lampu við vaskið, har veggurin ikki er klæddur við linolium.

Tað má ikki borast í altanirnar. Tær hava neyðugu styrkina til at brúkast sum altanir, men kunnu vikna, um borað verður í teir.

**Legg til merkis:**
IKKI bora hol í veggir á wc/baðirúmum, har sum klætt er við linolium.
IKKI bora hol í loftini, men hong loftslampur í samankomingarnar millum pláturnar á longu síðuni.
IKKI bora hol á altaninum.
IKKI bora hol í vindeyga-/hurðakarm.
IKKI bora hol beint yvir/undir stikkontaktum.
IKKI klistra navnamerkir o.a. á úthurð, innihurðar, køliskáp o.tíl. ella á ganginum.

## Persiennir/gardinur

Hvørki vindeygu ella altanhurðar hava gardinur ella persiennir. Tær skal leigarin sjálvur skaffa og seta upp. Tær skulu setast fastar í tilsetningin ella veggin og ikki í sjálvan vindeyga- ella hurðakarmin.

## Hvítvørur og tílíkt í íbúðini

Í íbúðini er køliskáp við frystirúmi, komfýrur, ovnur og eimhetta. Tað er ikki loyvt at seta upp eyka hvítvørur, sum brúka nógvan streym (uppvaskimaskinu, eyka frystiboks o.a.), í íbúðini, uttan skrivligt loyvi er fingið til tað frá frá Bústøðum. Tó kanst tú seta mikrobylgju-ovn upp í íbúðini.

## Terrassuhitarir og grill

Tað er ikki loyvt at seta terrassuhitarar á altanirnar. Fyri brunatrygdina er heldur ikki loyvt at hava grill á altanunum. Víst verður til pláss niðri í garðinum, har til ber at grilla.

## Hurðar - læsa og lata hurðar upp

### Felags inngangir og elevatorar

Høvuðsinngongdirnar eru stongdar millum kl. 22 á kvøldi og kl. 7 á morgni. Hesar tíðir nýtir tú chip-lykilin fyri at koma inn gjøgnum høvuðsinngongdirnar við at leggja chip-lykilin móti plátuni, sum er við hondtakið. Hurðin stongir sjálvvirkandi aftur eftir nøkur sekund.

### Hurð inn á gangin

Tú nýtir chip-lykilin fyri at koma frá felags inngongdunum/trappunum/elevatorinum til gangirnar, har íbúðirnar eru. Tú leggur chip-lykilin móti plátuni, sum er við hondtakið. Hurðin stongir sjálvvirkandi aftur eftir nøkur sekund.

## Hurð til íbúðina

Tú nýtir cylindara-lykilin fyri at koma inn í tína egnu íbúð. Tú letur upp við at snara lyklinum til tað klikkjir, og hurðin er opin. Hurðin læsir ikki sjálv aftur.

## Hurð til altan

Hurðin kann vera í 3 støðum:  Opin, læst og sett føst í ávísa opna støðu. Ansið eftir at loysa hurðina, tá hon er sett føst í ávísa støðu, áðrenn tú togar/trýstir á hurðina til altanin, tí annars kanst tú oyðileggja læsiskipanina. Minst til at lata hurðina vera á glopp og seta handtakið í hurðini í læsta støðu, tá farið verður út á altanina, so tú kanst sleppa inn aftur frá altanini.

## Hurð til vaskirúm og goymslurúm

Hesar hurðar eru altíð stongdar. Tú mást nýta chip-lykilin fyri at lata hurðarnar upp við at leggja chip-lykilin móti plátuni, sum er við hondtakið. Hurðin stongir sjálvvirkandi aftur eftir nøkur sekund.

## Vindeygu – lata upp og aftur

Vindeyguni hava barnasikring sum ger, at tey bert kunnu latast eitt sindur upp, um ikki tú loysir barnasikringina.

## Reingerð og viðlíkahald av hurðum og vindeygum

Vindeygu og hurðar skulu javnan reingerast. Nýt vanligt vatn og reingerðarevni. Nýt ein bleytan klút at vaska við. Um tú eigur ein vindeygaskavara, so kanst tú nýta hann at skava sápu av glasinum við. Annars kann eisini ein turrur bummulls- ella trevjaklútur nýtast at turka eftir við.

Um tú heldur at vindeygu/hurðar eru trekar, so sig húsavørðinum frá, áðrenn nakað brotnar. Tað er vanligt at tað skal hálast/trýstast eitt sindur á úthurðina, tá hon skal læsast.

## Sikringar og HPFI-rele

Tá tú skal hongja lampu upp e.tíl. skal tú sláa tann partin av streyminum frá, sum lampustaðið hoyrir til, meðan tú hongir lampuna upp.

## Roykvarnarar

Tað eru settir roykvarnarar upp í íbúðini. Teir eru íbundnir streym, men hava eisini battarí, um streymurin fer.

## Hiti

Hitin í íbúðini er fyrst og fremst við radiatorum. Tó hava íbúðirnar á niðastu hædd gólvhita. Set radiatorin á millum 2 og 3 og lat standa eina løtu fyri at vita, um hitin skal regulerast upp ella niður fyri at vera hóskiligur. Í baðirúminum eru hitin í gólvinum.

## Installatiónsskáp

Installatiónsskáp er á ganginum. Skápið skal ikki nýtast sum goymsluskáp ella tílíkt og skal altíð vera atkomuligt.

## Ventilatión

Ventilatiónin er sjálvvirkandi. Ikki broyta innstillingina, uttan at húsavørðurin er við, ella hevur góðtikið tað.

## Baðirúm

Einki baðiforhang er í baðirúminum. Tað skal leigarin sjálvur heingja upp í tey rør/skinnarar, sum eru til tað í baðirúminum.

Knarvar at heingja hondklæðir á eru í baðirúminum.

Baðirúmið verður hildið reint við vanligum vatni og reingerðarevni. Ger reint so ofta, sum tørvur er á tí. Til spegil og glas verður nýtt vanligt spegl/glasreins.

Gólvristin skal ofta haldast rein fyri hár og sápurestir. Um tú í eina tíð ikki nýtir baðirúmið (t.d. tí tú hevur verið í feriu), kann vatnlásið gerast turt, og luktur koma frá frárenslinum. Hesin luktur heldur uppat, tá vatn aftur er komið í vatnlásið. Um eingin er í íbúðini í eina tíð, t.d. í sambandi við feriu, verður mælt til at stoyta eitt sindur av matolju í vatnlásið í baðirúminum. Oljan flýtur omaná vatninum og ger, at vatnið ikki dampar burtur.

## Ljós í loftinum

Tá innbygdu perurnar í loftinum ikki rigga, skal tú seta teg í samband við húsavørðin.

## Køkurin

Í íbúðini eru vegleiðingar til eimhettuna, ovnin, komfýrin og køliskápið. Haldið tykkum til hesar vegleiðingar í sambandi við nýtslu og reingerð.

## Sjónvarp og internet

Stikk eru í íbúðini til sjónvarp og til internet.

Um tú ynskir televarps-pakka, mást tú sjálv/-ur siga Føroya Tele frá, hvønn sjónvarpspakka, ið tú ynskir, og rinda beinleiðis til Føroya Tele fyri tað.

Tú kanst seta tína teldu o.tíl. beinleiðis til internet við kaðali, sum tú skaffar, ella skaffa tær ein tráleysan internet-routara at seta í stikkið til internet og seta hann upp eftir tínum tørvi. Internetpakkin er avtalaður fyri øll leigumálini og er íroknaður húsaleiguna.

## Gólv – viðlíkahald

Fyri ikki at seta merkir í gólvið, skal tú seta filt-dubbar undir bein á tí innbúgvi, sum stendur beinleiðis á gólvinum. Við høvuðsinngangirnar eru máttur, so tað ringasta kann turkast av skógvunum, áðrenn farið verður inn.

## Gangir

Gangirnir eru fluktvegir, so har skal altíð vera rudduligt og reint. Har skulu hvørki súkklur, barnavognar ella ella annað vera.

## Elevatorar

Tað eru tveir elevatorar í bygninginum. Tann eini er við høvuðsinngongdina frá garðinum, sum leiðir til íbúðirnar Tróndargøta 52, sum er móti Sjúrðargøtu, meðan hin er við høvuðsinngongdina frá garðinum, sum leiðir til íbúðirnar Tróndargøta 50, sum er móti Tórsgøtu.

Eingin lásaskipan er til elevatorin. Um tú hevur tørv á at flyta størri innbúgv o.tíl. við elevatorinum, so mást tú halda eyga við, at tað ikki verður farið upp um vektina, sum elevatorin kann bera. Ansa eisini eftir ikki blokera elevatorin ov leingi.

## Hjartastartari
Ein hjartastartari hongur í tunlinum móti Tórsgøtu.

## Parkering
Nøkur parkeringspláss eru í garðinum og nøkur eru fram við Tróndargøtu og Sjúrðargøtu. Hetta eru almenn parkeringspláss.

## Skaðar í arbeiðstíð og aðrir fyrispurningar
Tú kanst seta teg í samband við Bústaðir við øllum vanligum fyrispurningum um leigumálið, leigusáttmálan, ella um okkurt ikki virkar, sum tað skal.

Skrivstovan:
Bústaðir – Føroya bústaðafelag
Yviri við Strond 6
Postsmoga 215
110 Tórshavn

Upplatingartíðir:
Mánadag, týsdag og hósdag kl. 10-12
Mikudag og fríggjadag er stongt

Telefon nr. 401000
Teldupostur: bustadir@bustadir.fo
Sí annars heimasíðuna: www.bustadir.fo

## Skaðar uttanfyri vanliga arbeiðstíð
Bert um **álvarsligir** skaðar eru, sum ikki kunnu bíða, t.d.:

- Vatnlekar,
- skaðar eftir innbrot ella herverk,
- skaðar eftir eldi í íbúðini, gangum, vaskirúmi ella øðrum felagsøkjum,
- skaðar á el-installatiónir ella eftir at streymurin er farin,
- ongin hiti,

kann ringjast á vakt telefonina hjá Húsavørðinum tlf. 401040

Alt annað má bíða, til húsavørðurin hevur avgreiðslutíð ella við at senda boð við telduposti til bustadir@bustadir.fo. Tú kanst eisini seta teg í sambandi við Bústaðir í upplatingartíðini.

Um eldur er í, skal ringjast til brandstøðina á tel. 112.

Um tað er innbrot, herverk ella tílíkt, skal ringjast til løgregluna á tel. 112.

## Húsavørður
Húsavørðurin er at hitta á Finsen mánadagar kl. 11:00-12:00.

Vakt telefonin hjá húsavørðinum svarar uttanfyri telefontíðina hjá Bústøðum, men skal bert ringjast til um talan er um álvarsligar skaðar, sí .

## Broytingar

Bústaðir kunnu gera broytingar í tí, sum stendur í hesum vegleiðingarskrivi. Á heimasíðu okkara www.bustadir.fo kanst tú finna tí útgávuna, sum er galdandi.